# yri stórbýin og bygdirnar



*Nýggja býráðið í Havn: Aftara rað frá vinstru: Jens Marius Poulsen, býráðsskrivari. Leivur Hansen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Marin Katrina Frídal, Hildur Eyðunsdóttir, Høgni Mikkelsen. Fremst: Annika Olsen, Jan Christiansen, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Katrin Dahl Jakobsen*

*Mynd: Jan Müller*

Eitt annað mál í hesum sambandi er arbeiðið við at minka um bilatalið í miðbýnum. Teir stóru trupulleikarnir við at finna parkerinspláss í miðbýnum skal gerast nakað við, við P-húsum, kjallarum og tunnlum.

Fótgangarnir fáa betri umstøður, eins og súkklubreytir verða skipaðar alla staðni har pláss er. Kavaruddingin skal bøtast, so fólk fáa gingið á gongubreytunum tá hálka og kavi er.

Umhvørvið hevur ein serligan áhuga í nýggju býráðssamgonguni. Ja, ein sær tað enntá sum sína uppgávu at ganga undan á hesum økinum, og tí skal gerast ein ítøkiliga AGENDA 21 ætlan. Í hesi skulu borgararnir eisini eggjast til at taka lut í hesum arbeiðinum.

Ætlanin er at áirnar verða reinsaðar og ruddaðar. Hetta arbeiðið skal eisini gerast fram við strondunum, í fjøruni við allar vágirnar. Sum ein víðari part av hesum verða teir árligu ruddingardagarnir verða tiknir uppaftur.

Tey eldru verða heldur ikki gloymd í avtaluni. Her skal arbeiðast fram ímóti at eitt eldraráð verður sett á stovn, eins og tann bráðneyðugi tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum verður nøktaður skjótast gjørligt. Dentur skal leggjast á røktarheimsfyribyrgjandi tiltøk, eins og tænastan við heimavitjanum verður útbygd tey komandi fýra árini.

### Betra um umhvørvið

Umstøðurnar hjá teimum ferðandi skulu somuleiðis betrast tey komandi fýra árini. Her skal fyrst gerast ein heildarætlan fyri ferðsluviðurskiftini út frá eini ætlan, sum byggir á nullhugsjónina.



*Fráfarandi borgarstjórin, Jan Christiansen heldur sína seinastu røðu á býráðsfundinum hóskvøldið, tá nýggja býráðið varð skipað. Komandi borgarstjórin, Heðin Mortensen lýðir á við spenningi og áhuga*

*Myndir: Jan Muller*

## Heðin er tann 18. í røðini

*- Tórshavnar kommuna hevur verið fyri stórari menning seinastu mongu árini. Hon hevur eftir førimuni fylgt við tíðini, so hon í dag er eitt framkomið samfelag, ið uttan at blúgvast kann bera høvuðsstaðarheitið, segði Heðin Mortensen í fyrstu røðu síni sum borgarstjóri í Havn*



Heðin Mortensen er tann 18. borgarstjórin í Havn. Býráðið, ið nú situr, er tað 25. í røðini, síðani Havnin gjørdist sjálvstøðug kommuna í 1866. Fyrstu tíðina var fútin føddur formaður. Fyrsta býráðsvalið, sum vit kenna tað, var í 1908, og fyrsta býráðið tók við 1. januar í 1909.

Nú Heðin Mortensen umboðar Javnaðarflokkin er tað aðru ferð, at flokkurin hevur borgarstjóran. J. P. Henriksen, sum fyrst umboðaði Havnar Arbeiðsmannafelag og síðani Javnaðarflokkin í býráðnum, var borgarstjóri í tveimum umførum. Fyrru ferð frá 1944-48 og seinnu ferð frá 1952-57. Tá Havnar Arbeiðsmannafelag stilla upp til býráðsval í Havn stilla Javnaðarflokkurin onga lista upp.

### Yvirlit yvir býráðsformenn í Tórshavn

1. Mads Andreas Winther 1909 - 1912
2. Søren E. Müller 1913 - 1920
3. Anton E. Degn 1921 - 1922
4. H.C.W. Tórgarð 1922 - 1924
5. Valdemar Lützen 1925 - 1928
6. Johannes O. Joensen 1929 - 1932
7. M. A. Jacobsen 1933 - 1944
8. J. P. Hendriksen 1944 - 1948 og 1952 - 1957
9. Kjartan Mohr 1949 - 1951 og 1971
10. Sigfried Skaale 1958 - 1967
11. Peter F. Christiansen 1968 - 1969
12. Hanus við Høgadalsá 1970
13. Petur Christiansen 1972 - 1980
14. Poul Michelsen 1981 - 1992
15. Lisbeth L. Petersen 1993 - 1996
16. Leivur Hansen 1997 - 2000
17. Jan Christiansen 2001 -2004
18. Heðin Mortensen 2005-

## Íbúgvaratal søguligt yvirlit

| Ár | Tórshavn | Føroyar |
|---|---|---|
| 1801 | 554 | 5.255 |
| 1901 | 1.656 | 15.230 |
| 1925 | 2.896 | 22.835 |
| 1950 | 5.607 | 31.781 |
| 1975 | 11.329 | 40.441 |
| 1980 | 12.641 | 43.287 |
| 1985 | 13.507 | 45.610 |
| 1990 | 14.689 | 47.485 |
| 1995 | 13.781 | 43.394 |
| 1997 | 15.844 | 44.290 |
| 1998 | 16.121 | 44.814 |
| 1999 | 16.469 | 45.400 |
| 2001 | 17.939 | 46.180 |
| 2002 | 18.420 | 47.701 |
| 2003 | 18.635 | 48.205 |

# dirnar mannaðar

Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen

**Byggi- og býarskipanarnevndin:**
Jógvan Arge, formaður
Elin Lindenskov
Leivur Hansen
Sjúrður Olsen
Bjarti Mohr

**Heilsu- og umhvørvisnevndin:**
Elin Lindenskov, formaður
Marin Katrina Frýdal
Hildur Eyðunsdóttir

Jan Christiansen
Beate L. Samuelsen

**Havnanevndin:**
Leivur Hansen, formaður
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Bjarti Mohr
Annika Olsen

**Kaldbaksnevndin:**
3 limir eru valdir av borgarum í Kaldbak og Kaldbaksbotni.
Heðin Mortensen
Høgni Mikkelsen

**Hvítanesnevndin:**
3 limir eru valdir av borgarum á Hvítanesi.
Heðin Mortensen
Annika Olsen

**Kollfjarðarnevndin:**
3 limir eru valdir av borgarum í Kollafirði, Oyrareingjum og Signabø.
Heðin Mortensen
Sjúrður Olsen

**Kirkjubøar-Velbastaðarnevndin:**
3 limir eru valdir av borgarum í Kirkjubø og á Velbastað.
Heðin Mortensen
Bjarti Mohr

**Hest-koltursnevnd:**
3 limir eru valdir av borgarum í Hesti og Koltri.
Heðin Mortensen
Jan Christiansen

**Nólsoyarnevndin**
3 limir eru valdir av borgarum í Nólsoy.
Heðin Mortensen
Jan Christiansen